# Føroyska lagnustundin í Kiel í 1814

Fyrilestur í røðini Vísindavøkan á ferð september 2017

Hans Andrias Sølvará, ph.d., lektari í søgu, Søgu- og samfelagsdeildin,
Fróðskaparsetur Føroya

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Ein føroysk lagnustund?

”Alternativet i 1814 var jo ikke samhørighed med Norge, det var indlemmelse i det britiske imperium. Var det sket, ville det uden tvivl være gået Færøerne, Island og Grønland, som det er gået Orkneyøerne og Shetlandsøerne, der har en stolt nordisk fortid, men hvor der i dag efter 500 års britisk herredømme intet er tilbage af det norrøne. Alt er engelsk. På samme måde ville Grønland, Island og Færøerne være blevet opsuget af den forførende, men også uimodståelige angelsaksiske kultur, og der ville i dag ikke være blevet talt et ord færøsk på Færøerne, ikke ét ord grønlandsk i Grønland og ikke ét ord islandsk på Island. Der ville ikke have været noget færøsk flag at lade glide til tops i dag, og der ville heller ikke have været noget grønlandsk eller noget islandsk flag. Det ville have været Union Jack overalt. Der ville heller ikke have været selvstyre i Grønland og på Færøerne, som vi kender det i dag – man ville have haft lokalrådsordninger af den type, som vi i dag finder på Orkneyøerne og på Shetlandsøerne, og republikken Island ville ikke have eksisteret. Island ville have været en engelsktalende ø med et internt hjemmestyre i stil med, hvad man kender fra Falklandsøerne. Og alle tre ville som integrerede dele af Storbritannien have været medlemmer af EU siden 1973 og i dagens brexit-tummel have haft de samme problemer at slås med som Shetlandsøerne og Orkneyøerne.”

Thorkild Kjærgaard, 2016

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Søguligar treytir

Føroyar sjálvstøðugt land 400/800-1274 – norskar siðvenjur

Føroyar undur norsku krúnuna í 1274 – biland, skattland, koloni

Noreg undir donsku krúnuna í 1380

Einaveldislóg fyri bæði ríkini í 1661

Kongalógin í 1665

Nærri Keypmannahavn

- Siðaskiftið umleið 1540
- Fyrisitingin flutt úr Bergen til Keypmannahavn í 1620
- Norska Lóg Kristians 4. í 1604 - Norska Lóg Kristians 5. í 1688
- Frá 1813 skudu logir setast í gildi í Føroyum eftir serligum reglum
- Staðbundnir myndugleikar (Amtmanðurin) ummælisrætt í 1821
- Løgtingið ummælis-og initiativrætt í 1852

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Napoleonskríggini (1804-1815)

Kríggj í Evropa eftir fronsku kollveltingina, tá Frakland í 1792 fór í kríggj við Eysturríki – frá 1804 við Napoleon sum keisara

Bretar bumba Keypmannahavn í 1807, taka flotan, og noyða Danmark at nærkast Fraklandi:

Hertaka sum í 1801 donsku hjálondini í Vesturindia og India umframt Helgoland og - í 1809 - Anholt

Napoleon tryggjar í 1807 integritetin hjá tí dansk-norska ríkinum

Svøríki missur Finland til Rusland í 1809 (Frederikshamntraktatin)

Bretar átaka sær í 1810 at "verja" tær "donsku" atlanterhavsoyggjarnar og at lata tær aftur til danska kongin eftir kríggið

Jean Baptiste Bernadotte - Karl Johan – verður svenskur krúnprinsur í 1810

Danmark endurnýggjar í mars 1812 avtaluna við Frakland

Svøríki fær í 1812 og 1813 russisk og bretsk lyfti um stuðul til at fáa Noregi

Frakland fer í juni 1812 í kríggj við Rusland

Í desember 1812 fær Danmark boðið týsk svensk øki (svensk Pommern og Rygen) í býti fyri Noregi, men Frederik VI vísur avgjørdur tilboðnum frá sær

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA


ATLANTIC OR WESTERN OCEAN
THE GULF STREAM According to GOVERNOR POWNALL
NORTHERN OCEAN
ATLANTIC OR WESTERN OCEAN
ICELAND
HUDSON'S BAY
HUDSON'S STRAITS
DAVIS STRAIT
LABRADOR OR NEW BRITAIN
Eskimaux Country.
NEW SOUTH WALES
NORTH AMERICA
CANADA
UNITED STATES
NEW ENGLAND
PENNSYLVANIA
VIRGINIA
CAROLINA
GEORGIA
FLORIDA
LOUISIANA
GULF OF MEXICO
BAHAMA OR LUCAYOS ISLANDS
CARIBBEAN SEA
The Great Fishing Bank
AZORES ISLES
CANARY ISLES
CAPE VERD Is.
Tropic of Cancer
EQUINOCTIAL LINE
Upper Course from Britain to Carolina & Virginia
Usual Course from Britain to the West Indies Carolina & Virginia for sake of the Tradewinds
Track from England to New Foundland
BRITISH ISLES
BRITISH CHANNEL
NORTH OR GERMAN SEA
BAY OF BISCAY
FRANCE
SPAIN
GERMANY
NORWAY
SWEDEN
FINLAND
BALTIC SEA
PRUSSIA
EUROPE
TURKEY
MEDITERRANEAN SEA
BARBARY
AFRICA
ZENHAGA
GUINEA
GULF OF GUINEA
GUAYANA
SOUTH AMERICA
BRAZIL
NORTH SEA
SOUTH SEA
Gallapagos or Inchanted Islands
GUAYAQUIL
PAYTA
English, French and Spanish Sea Leagues 20 in a Degree.

# Týðandi persónar í samráðingunum

Svøríki:

Gustav Wettersted, samráðingarleiðari

Lars Engstrøm, uttanríkisráðharri

Karl Johan, krúnprinsur

Danmark:

Edmund Bourke, samráðingarleiðari

Niels Rosenkrantz, uttanríkisráðharri

Fríðrikkur 6, dansk-norskur kongur

Ongland:

Edward Thornton, enskur sendiharri í Stokholmi, samráðingarleiðari

Stewart Castlereagh, enskur uttanríkisráðharri

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Samráðingar í Kiel í 1814

Samráðingar millum Danmark, Svøríki og Ongland byrja í Kiel í januar 1814

- Frakland tapur í 1814 kríggið móti m.a. Onglandi, Ruslandi og Svøríki
- Svensku krøvini mótvegis Danmark um at fáa Noregi herðast í 1813
- Fríðrikkur VI gevur 7. januar 1814 Edmund Bourke heimild til at sámráðast við Wettersted og Thornton (t.e.. Svøríki og Ongland) um at lata ”tout le Royaume de Norvége”, t.e. “alt kongaríkið Noregi” til Sverige
- Bourke hevði 8. januar 1814 ein fund við Rosenkrantz um samráðingarnar
- Tann 9. januar 1814 fer Edmund Bourke fyri triðku ferð til Kiel
- Samráðingarnar byrja veruliga 10. januar, tá Bourke kemur til Kiel
- Svensk-donsk og ensk-donsk friðaravtala undirskrivað 14. januar 1814:
  - Danmark missur Noreg - men ikki Island, Grønland og Føroyar til svenska kongin og fær alt enskt hertikið økið aftur frá Onglandi – uttan Helgoland
- Rós í Keypmannahavn til Bourke og rís til Wettersted í Svøríki

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Friðurin í Kiel 14. januar 1814

Danski kongurin varð noyddur til at lata kongaríki Noregi til svenska kongin "la Groenlande, les îles de Ferroe et l´Islande non comprises", á føroyskum "Grønland, Føroyar og Ísland ikki íroknaðar", kom í síðstu løtu inn í § 4 í sáttmálanum

Hvaðani kom innskotið um undantakið um ´tær norðuratlantisku oyggjarnar`?

- Frá danska samráðingarleiðaranum Edmund Bourke ella frá danska uttanríkisráðharranum Nils Rosenkrantz
    - Eldri gransking leggur herðslu á dugnaskapin hjá Edmund Bourke, sum skuldi havt sannført sviar um, at oyggjarnar ongantíð vóru norskar
    - Nýggjari gransking hevur peikað á, at diplomatar hava avmarkaðar heimildir – t.e. peikar á Nils Rosenkrantz
- Frá  Danmark, Svøríki ella Onglandi
    - Nýggj gransking hevur lagt herðslu á stórpolitisk áhugamál

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Hví skiltust Føroyar og Noregi í 1814

**Teoriir um vantandi vitan**

Wettersted var óvitandi um, at atlantisku oyggjarnar høvdu hoyrt til Noregi:

”Hóast Ísland, Grønland og Føroyar ongantíð hava hoyrt til Noregi, so hevur Hr. Burke ynskt, og tað havi eg ikki hildið tað vera neyðugt at seta meg upp ímóti, at tær fingu serliga umrøðu í grein 4. í sáttmálanum” - Wettersted 16. januar 1814 til svenska uttanríkisráðharran Engström

Svøríki setti bert krøv fram um at fáa Noregi (Fastlands-Noregi)

“Alt kongaríkið Noregi, tey her nevndu bispadømi og fylki, Kristiansand, Bergenhús, Aggershús og Tróndheim, Nordland og Finnmørkin, at markinum til russiska heimsveldinum. ” – tað upprunaliga svenska sáttmálauppskotið

Karl Johan var ikki áhugaður í teimum Norðuratlantisku oyggjunum

Bretar - sum til seinastu løtu ætlaðu at annektera oyggjarnar - forðaðu av stórpolitiskum grundum Svøríki í at fáa harradømi yvir atlantisku oyggjunum

“Vit eru til reiðar at seta inn í friðaravtaluna, at alt hertikið danskt økið vil verða latið aftur við oynni Helgoland sum einasta undantak” - Thornton í boðum til Rosenkrantz í mai 1813

**Teoriir um stórpolitisk áhugamál**

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Hvussu kom Noregi saman við Svøríki

Í upprunaliga danska – og svenska - sáttmálatekstinum stóð:

“alt kongaríkið Noreg skuldi handast Svøríki og vera ein partur av Svøríki”

Í endaliga tekstinum kom eftir ynski frá Wettersted/Karl Johan at standa:

”alt kongaríkið Noregi, tey her nevndu bispadømi og fylki, Kristiansand, Bergenhús, Aggershús og Tróndheim, Nordland og Finnmørkin, at markinum til russiska heimsveldinum. Hesi bispadømi, stift og landslutir, sum eru alt kongaríkið Noregi, íroknað allir íbúgvar, býir, havnir, skansar, bygdir og oyggjar við allar strendir, umframt hartilhoyrandi ognir – Grønland, Føroyar og Ísland herí ikki íroknaðar – eins og øll serrættindi, rættindi og fyrimunir, skal framyvir hoyra til svenska kongin við fullum ognarrætti og yvirvaldsrætti og vera eitt kongaríki sameint við tað svenska”

Frágreiðingar:

Taktikkur hjá Karl Johan – vildi ikki leggja seg út við norska fólkið

Bretskt trýst á Svøríki – avtalan frá 1813

Karl Johan vildi tryggja sær eina bakdyr móti “en gustaviansk restaurasion”

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Danskar/svenskar reaktiónir aftaná

”Tað varð bjargað, sum møguligt var at bjarga, m.a. Ísland, Grønland og Føroyar” – Rosenkrantz í brævi til vinmannin Ernst Schimmelmann 17. januar 1814

”Tað er av órøttum, um man hevur vissa Hr. Barón um, at Ísland og Grønland ikki høvdu hoyrt til kongaríkið Noregi. Hesar hava eins og Orknoyggjar fingið sínar íbúgvar úr  hesum landi, og Ísland eins og Grønland hava ongantíð verið undir øðrum landi” - Engstrøm í brævi til Wettersted 5. februar 1814

”Eg síggi í einum brævi frá Wettersted baróni, at hann hevði fingið at vita, at Ísland og Grønland ongantíð høvdu hoyrt til Noregi. Men tað er fullkomiliga í stríð við sannleikan. Fólkið er komið úr Noregi, og hesar báðar oyggjar hava ongantíð hoyrt til onnur enn hetta kongaríkið. Hetta er ávíst av øllum søgufrøðingum og er enntá prógvað í almennum skjølum. Tað er fyri at tryggja handilslig áhugamál í Keypmannahavn, at Bourke vildi hava tær undantiknar.” - Engstrøm í brævi til Karl Johan 6. februar 1814

# Noregi og Friðurin í Kiel

Friðarsáttmálin í Kiel var ein fólkarættarlig avtala millum Danmark og Svøríki – umboðsmenn fyri Noregi luttóku ikki í samráðingunum og Noregi var ikki samráðingarpartur og undirskrivaði tí heldur ikki sáttmálan 14. januar 1814

Karl Johan 8. februar: Noreg skuldi vera egið ríkið við tjóðumboðan og grundlóg

Noreg fekk egna grundlóg 17. mai 1814 – sáttmála við Svøríki 14. august 1814

Noreg kravdi í 1815-1818 at fáa oyggjarnar aftur frá Danmark

Eitt samt Stórting avgjørdi seinni, 29. mai 1821, í sambandi við uppgerð við Danmark um skuldini hjá dansk-norska ríkinum:

> "Stortinget vedtager og erkender på Norges vegne at betale 3 millioner rd. hamb. bc. som andel i det forrige dansk-norske monarchies fælles statsgæld, og hvorved således alle gensidige fordringer i anledning af foreningen mellem Danmark og Norge skulle være og blive aldeles op- og afgjorte"

Einki hoyrdist úr Noregi um ´atlantisku oyggjarnar` fyrr enn eftir 1905

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Nærri Noregi

Aftaná 1905 søgdu nakrir norðmenn, m.a. Noregs Ungdomslag, at Noregi ongantíð hevði góðtikið Friðin í Kiel

´Maalmænd` í Noregi og føroysk sjálvstýrisfólk høvdu felags áhugamál – føroyskt stríð um kirkju- og undirvísingarmál

Í 1908 vóru fleiri hundrað føringar í Noregi á eini norrønari legu, sum Norges Ungdomslag skipaði fyri

Í 1911 vóru nógvir norðmenn í Føroyum. Ein av teimum - Nikolaus Gjelsvik – segði seinni við norska blaðið Den 17. Mai:

> "Da jeg var paa Færøyane i 1911 kom det til meg færøyingar som eg ikkje kjende og som ikkje kjende meg og spurde um det ikkje var von um at Færøyane kunde koma saman med Noreg att, "for det vil vi alle so gjerne"."

Í 1914 fíggjaði Noregs Ungdomslag eina føroyska týðing av Robinson Kruso – ókeypis til øll føroysk skúlabørn yvir 10 ár

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Føroyar millum Danmark og Noregi

Hetta fekk størri týdning og avleiðingar fyri sjálvstýrisrørsluna í Føroyum í 1920-árunum, tá stríð tók seg upp millum Danmark og Noregi um Eysturgrønland

Friðurin í Kiel umrøddur í Fólkatinginum í 1916

Norsk, donsk og føroysk bløð skrivaðu nógv um donsk-norsku ósemjuna í 1920-árunum

Jóannes Patursson hevði lisið í Noregi og var norskt sinnaður

I 1923 var Jóannes Patursson í Noregi, har hann ferðaðist millum norsk tjóðskaparfólk, t.d. búði hann eitt tíðarskeið hjá stortingsmanninum og hægstarættardómaranum Johan Castberg

Umvegis skriving hjá norska professaranum Nikolaus Gjelsvik vórðu Jóannes Patursson og Oliver Effersøe drignir inn í eina fólkarættarliga ósemju millum Danmark og Noregi, sum eisini ávirkaði føroyskan politikk

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Føroyar og Noregi

Noregsmálið varð reist á Løgtingi og á Ríkisdegi og hevði við sær brot millum Sjálvstýrisflokkin og ríkismyndugleikarnar

Í 1920-árunum skrivaðu sjálvstýrisfólk nógvar greinar í norskum bløðum

Í 1931 stevndi Danmark Noregi inn  fyri altjóða dómstólin í Haag í einum spurningi um yvirvaldsrættin í Eysturgrønlandi

Domstólurin gav í 1933 Danmark viðhald í, at yvirvaldsrætturin var í Danmark – m.a. við støði í, at Noregi í 1821 hevði góðtikið Friðin í Kiel

Í apríl 1940 komu nógvir norðmenn til Føroyar sum flóttar, m.a. Halvdan Koth, norskur uttanríkisráðharri í 1935-41, sum bert kendi ein føring – Jóannes Patursson - sum hann av tilvild hitti á bryggjuni í Havn

Summi fóru víðari til Onglands, m.a. Halvdan Koth, men nógvir búsettu seg í Føroyum, teir flestu í Klaksvík, og vóru búgvandi í Føroyum eftir kríggið

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Tann enski vandin

Føroyar vórðu latnar “aftur” til Danmark í 1814

Samanberingarnar við Hetland og Orknoyggjar halda ikki (1460´árunum)

Helgoland, sum kom undir Ongland í 1814, varðveitti sína frísisk-týsku mentan undir enskum yvirræði gjøgnum alt 1800 talið

Tær ensku Kanaloyggjarnar eru ikki komnar upp í ES saman við Onglandi

- Tær hava egið mál
- Tær hava sítt egna flagg
- Tær hava víðfevnt sjálvræði

Bretar lótu Føroyar aftur til Danmark eftir seinna kríggj – í 1945

Bretar loyvdu Newfoundlandi at hava fólkaatkvøðu um loysing í 1948

Bretski áhugin fyri norðuratlantisku oyggjunum er til at síggja burtur frá

# Takk fyri

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA